## Sonni L. Petersen aftur til NSÍ



*Sonni L. Petersen ætlaði sær upprunaliga at spæla við Skála í ár, men hevur nú broytt støðu, og verður ístaðin framhaldandi partur av liðnum hjá NSÍ*

**Fótbóltsleikarin sum fyrr í ár skifti til Skála, fer nú aftur til NSÌ**

FÓTBÓLTUR
*sportal.fo*

NSÍ var eitt av feløgunum, sum misti nógv fólk eftir kappingarárið í fjør. Ein av leikarunum sum fann sær nýtt felag, var Sonni L. Petersen.

Sonni býr á Strondum og tí avgjørdi hann eftir seinasta kappingarár at spæla við Skála.

Men nú fer Sonni L. Petersen so aftur til NSÍ. Eftir frágongdina síðsta heyst hevur NSÍ brúk fyri áleyparum, og tí kemur tað uttan iva væl við, at Sonni nú fer aftur til barndómsfelagið.

Eftir ætlan skuldi Sonni venja við NSÍ Mikukvøldið, og verður hann helst eisini partur av hópinum, sum leygardagin skal takast við FS Vágar.

# Nú rullar aftur

**Síðani januar mánaða hava flestu liðini av álvara fyrireikað seg til nýggja kappingarárið í fótbolti, og um vikuskiftið fer bólturin av álvara á rull aftur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir nógva tunga konditiónsvenjing, hópin av venjingardystum og fyri nakrar eisini undankappingardystir til steypakappingina, verður nú av álvara lagt til brots í kappingini um Løgmanssteypið.

Fyrsta umfarið er sum kunnugt talan um tríggjar bólkar, har tey bæði fremstu liðini í hvørjum, umframt teir báðir bestu trý'ararnir koma víðari í fjórðingsfinalurnar. Og hesa ferð er í øllum førum líkt til, at í flestu bólkunum verður talan um eitt sera spennandi stríð um at teljast millum liðini, sum eisini verða við í pottinum, tá tey seinastu átta skulu spæla sínar dystir.

### Nógvar skiftingar

Í bólki eitt er einki at ivast í, at tað eru tey trý fyrstu deildarliðini, B68, NSÍ og FS Vágar, sum ætla sær at stríðast um fremstu sessirnar, tó at tvøramenn ivaleyst eisini fara at royna at seta onkran kíla ímillum hjá hesum. Nú feløgini enn eiga til góðar at spæla teljandi dystir, er ilt at taka dagar ímillum, hvussu væl tey eru fyri. Ikki minst tí stórar útskiftingar hava verið í fjør. NSÍ, sum í fjør vann steypakappingina og gjørdist nummar tvey í landskappingini, hevur havt munandi frágongd. Tað sama hevur B68, sum í ár tykist hava sett logan nakað lægri, enn tey áður hava gjørt. Hinvegin hava vágamenn eitt lið, sum tykist vera nakað nógv betri fyri, enn tá teir seinast vóru í deildini, og spennandi verður at síggja, hvørjar fyrstu ábendingarnar um kappingarárið hjá teimum fara at verða.

### Nýggj andlit

Í næsta bólkinum er feskasta andlitið uttan iva AB, sum ongan tíð áður hevur rokkið hesum stigi í bólkaspælinum. Tó at fleiri av leikarunum helst hava roynt hetta í øðrum feløgum.

AB verður tó ikki einasta nýggja andlitið. VB, KÍ og EB/Streymur eru øll feløg, sum seinnu árini hava lagt stóra orku í ungdómsarbeiðið, og hjá teimum trimum hava greiðar ábendingar verið um, at nøkur nýggj fótbóltsnøvn eru um at trína inn á føroyska pallin. VB vann í fjør bæði dreingja- og unglingadeildina, og fara teir uttan iva at nýta steypakappingina sum eitt gott høvi at fáa nakrar av hesum leikarunum royndar á besta liðnum. KÍ hevur altíð borið orð fyri at hava ungar og evnaríkar leikarar, og hartil verður í so máta eisini spennandi at síggja, hvussu Jan Joensen fer at roynast í nýggja venjaraleiklutinum.

EB/Streymur tykist í ár at hava styrkt um hópin, bæði í dygd og breidd, og saman við teimum ungu leikarum, sum í fjør nærkaðust einum berandi leikluti á liðnum, verður uttan iva spennandi at vita, í hvønn mun teir kunnu gera seg galdandi í ár.

### Kanónbólkurin

Soleiðis varð triði bólkurin alt fyri eitt nevndur, tá lutakastið til steypakappingina hevði verið. Við verandi meistarunum úr HB, grannunum úr B36, sum eftir eitt ikki nøktandi kappingarár veruliga hava styrkt um hópin, og so GÍ, sum ongantíð kunnu avskrivast. Og so eisini Skála, sum við tilgongdini í ár als ikki skulu undirmetast.

Fyri at taka Skála fyrst, og tykist tað í øllum førum á pappírinum greitt, at teir ikki teljast millum liðini, sum kunnu væntast at koma víðari úr bólkinum. Hinvegin er lítið at ivast í, at teir fara at gera sítt til at gera av, hvør skal standa ovast, tá bólkaspælið er liðugt. Tilgongdin av nýggjum leikarum tykist í øllum førum sterk á pappírinum, og hóast tað tekur tíð at fáa nýggjar leikarar spældar inn, tykist dygdin í hesum at borga fyri, at Skála á ongan hátt verður nakað slag av walkover hjá hinum liðunum.

Sum verandi meistarar, og liðið við suverent sterkastu steypatraditiónunum í landinum er einki at ivast í, at HB ætlar sær víðari úr bólkinum. Størsti trupulleikin hjá liðnum tykist undan kappingini at vera verjuparturin, har frágongdin av sterkum leikarum hevur verið stór í vetur. Hinvegin hevur liðið eisini havt tilgongd, og evnaríkir ungir leikarar tykjast heldur ikki vera nøkur mangulvøra.

Grannarnir úr B36 vunnu alt fyri tveimum árum síðani, men í fjør gekst minni væl. Helst sum ein ásannan av hesum hevur leiðslan tí gjørt sítt til at styrkja um liðið. Leikarra í landsliðsflokki eru knýttir at felagnum í vetur, og fyri viðhaldsfólkini vil alt annað enn víðari luttøka í steypakappingini vera eitt stórt vónbrot.

Og so eru tað gøtumenn. Hóast liðið ikki longur hevur somu einkarstøðu, sum í gylta tíðarskeiðnum í 90'unum, so teljast gøtumenn altíð millum teir drúgvastu, og luttøka á hvørjum ári í europeiskum høpi undirstrikar eisini hesa sannroynd. Eitt ættarliðsskifti tykist í løtuni vera ávegis í Gøtu, har tað uttan iva kom illa við, at Sámal Joensen ikki longur er við. Men hinvegin, so hevur GÍ aloftast verið nakað heilt fyri seg.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

Kvinnur
23.03 14.30 Neistin-Stjørnan
23.03 15.00 VB-Kyndil
23.03 14.30 VÍF-Tjaldur

Menn
22.03 16.00 H71-StÍF
23.03 16.00 KÍF-VÍF

**Fótbóltur**

**Kappingin um Løgmanssteypið**

Bólkur 1
22.03 TB-B68 Birgir Sondum
22.03 NSÍ-FSV Páll Augustinussen

Bólkur 2
22.03 AB-VB Suni Johansen
22.03 KÍ-EB/S Oddmar Andreasen

Bólkur 3
22.03 GÍ-B36 Lassin Isaksen
23.03 HB-Skála Dagfinn Olsen



*Runavíkingar gjørdust í fjør steypavinnarar, men eins og hjá flestu av hinum liðunum, so hava runavíkingar havt nakrar skiftingar í leikarahópinum, so undan bólkaspælinum tykist tað sera opið, hvussu liðini fara at standa*

Vikuskifti

Nr. 57 • leygardagur • 22. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Frástøðan er neyðug

Kann man ummæla ummælaran? Kim Simonsen hugleiðir um at ummæla bókmentir og list í Føroyum.

Lesið síðu 6 & 7





*Katrin er so góð við kaninir sínar, sum nú hava fingið ungar. Tá hon og mamma hennara gjørdu av, at hon skuldi fáa kaninir, lovaði hon at passa dýrini væl, og tað lyftið hevur hon eisini hildið*

# Á Norðoyri er gott at búgva

Í bilportrinum hjá Katrin og teimum stendur ein kassi, sum abbi hennara hevur smíðjað eftir uppskrift úr eini bók, sum Katrin lænti á bókasavninum. Har býr kaninparið, Pjuska og Ninus, og tey eiga 4 fittar og mjúkar kaninungar

BØRN OG SPÆL
*Orð: Rúna Sivertsen*
*Myndir: Jens K. Vang*

Fyri smáum trimum árum síðani flutti tíggju ára gamla Katrin saman við foreldrunum og beiggja sínum, Jóhannes, úr stórbýnum, Odense, út á Oyrar á Borðoynni at búgva. Húsini hjá teimum standa undir vegnum, tætt við fjøruna við útsýni heim móti Klaksvíkini. Hon stórtrívist og sigur, at har eru nógv børn at spæla við og altíð okkurt at gera.

Í góðveðrinum mikudagin vóru vit við myndatólinum úti á Norðoyri og vitjaðu Katrin og vinkonur hennara, Katrin og Honnu.

Katrin er dóttir Jancy Biskopstø og Petur Klein. Tá tey í august 2000 fluttu heimaftur til Føroya eftir lokna útbúgving, keyptu tey hús á Norðoyri. Og tað hava tey ikki angrað.

### Nógv betur í Føroyum

Húsini standa mitt í Guds fríu náttúru, tætt við fjøru, sjógv og haga. Útsýnið er gott, hvar enn tú hyggur. At hyggja út gjøgnum køksvindeyga, er sum at líta at einum málningi. Har síggjast smá úthús úr gróti og træi, og í baksýninum liggur Klaksvíkin goymd millum fjøllini.

Hanna og Katrin búgva í Klaksvík, men teimum dáma ógvuliga væl at fara út á Oyrar at spæla við Katrin.

- Mær dámar nógv betur í Føroyum enn í Danmark. Her eru so nógv børn at spæla við, og her er altíð okkurt at gera, sigur Katrin.

Hon sigur, at í Danmark mátti altíð onkur vaksin vera við teimum, sjálvt um tey bara fóru á spæliplássið beint uttanfyri. Tað helt Katrin vera nokkso keðiligt við hvørt.

Broytingin er sjálvsagt stór hjá einum barni, sum flytir heim úr einum býi sum Odense, ið telur um 300.000 fólk, heim á Norðoyrar, har 70-80 fólk búgva.

### Her tosa øll um Gud

Katrin er ein sera skilagóð genta, og hon dugir væl at seta orða á sínar hugsanir. Sjálvt um hon bara var 7 ára gomul, tá hon flutti heim, kendist umskiftið sum ein verulig broyting hjá henni. Ein dagin, tá tey vóru ávegis í bilinum, og útvarpið var frá, segði hon við mammu sína, at í Føroyum hoyra vit allastaðni um Gud.

Katrin ynskti sær so hjartaliga kaninir og ein dagin, hon var á bókasavninum við skúlaflokkinum, lænti hon sær bøkur um kaninir. Har stóð alt, sum er vert at vita, ætlar tú tær at fáa tær hetta fitta dýrið.

- Mamma segði, at eg kundi bara fáa kaninir, um eg tók mær væl av teimum, og tað havi eg so gjørt, sigur Katrin.

Og tað er ikki nógv, ið Katrin ikki veit um hesi djórini, sum hon so væl tekur sær av. Í bilportrinum stendur ein kaninkassi, sum abbi hennara hevur gjørt eftir uppskrift úr bókini, sum hon lænti á bókasavninum.

Í kassanum býr kaninfamiljan, men pápin, Ninus, er stungin av, og eingin veit við vissu at siga, hvar hann reikar. Helst er hann vorðin fornermaður, tí hann slapp ikki at verða í kassanum, tá ungarnir vóru smáir og uttan skinn, tí annars hevði hann etið teir.

Katrin sigur, at kaninir kunnu longu fáa ungar saman, tá tær eru bara 5 mánaðar gamlar.

*Framhald á síðu 2*